# Eldur:
# ein góður tænari, men beiskur harri



## Tendra rætt



Tað eru tríggir hættir at tendra kolgrillina. Fyri allar er tað galdandi, at kol ella brikkar skulu gløða javnt, áðrenn teir verða spjaddir í eitt javnt lag í grillini. Brúka tendriløg, spritttablettir ella pappír at tendra við. Ongantíð bensin ella spritt. Lat kolið súgva vætuna í nakrar minuttir, áðrenn tú tendrar.

### 1. Við tendriløgi

Legg kol ella brikkar í einar pyramidu í botninum á grillini og oys eitt javnt lag at tendriløgi yvir. Lat trekkja eina løtu og tendra. Gevur høgar logar og nógvan royk í byrjanini, so grillin skal standa í góðari frástøðu frá eldfimum tilfari. Javna kolið/brikkarnar út, tá tað er hitnað.
Brúka bara tendriløg, um grillin stendur meiri enn 2 metrar frá eldfimum tilfari.
Tekur ½-1 tíma.

### 2. Við tendriblokkum

Legg tendriblokkar í botnin av grillini og legg kol ella brikkar omaná. Tendra blokkarnar og bíða til kolið er reyðgløðandi og grátt.
Tekur ½-1 tíma.

### 3. Við grillrøri

Fyll eina hóskandi mongd av brikkum ella koli í tendrirørið (grillstartaran). Legg eitt leysliga rukkað pappír ella tendriblokkar undir ristina í grillstartaranum. Set hann í botnin á grillini, ella eitt annað trygt stað, og tendra pappírið ella tendriblokkarnar. Tá tað gløðir, verður tað spjatt út á grillbotnin.
Tekur uml. ½ tíma.

## Trygd

- Far ongantíð frá grillini. Hvørki meðan hon er í brúki ella áðrenn hon er heilt sløkt.
- Grilla altið úti undir opnum himni. Ikki undir hálvtekju, trøum ella líknandi.
- Hav altíð vatn nærhendis. Til dømis eina havaslangu, vatnkannu ella spann av vatni.
- Brúkar tú eingangsgrill, má undirlagið ikki vera eldfimt. Set grillina í sandin ella á vanligar flisar. Grillin kann geva merkir. Ansa eftir, at ongin kemur at traðka í grillina og sløkk hana væl við vatni. Verður hon brúkt á strondini, mást tú køla sandin væl aftan á. Hann kann vera fleiri hundrað stig, har grillin hevur staðið

**! *Oys ongantíð meira tendriløg á, tá tú hevur tendrað!!***

## Reingerð



Tøm øsku úr grillini viðhvørt.
Grillin skal vera køld og glóðirnar sløktar.
Reinsa ristina við einari stálbust og vaska í heitum sápuvatni. Pensla ristina við matarolju, tá hon er reinsað. Er hon gravskitin ber til at smyrja við hana við grønsápu og leggja hana í ein plastposa í eitt samdøgur. So er lættari at vaska.